## Syngjandi og talandi jødar á rundferð í Føroyum

**Hesar næstu dagarnar fara eini jødisk hjún at tala og syngja ymsastaðni á meginlandinum**

TRÚARLÍV

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í dag og í morgin, mikudagin, fara jødisku hjúnini, Lisa og David Loden at ferðast runt í Føroyum at tala og syngja á møtum og tiltøkum ymsastaðni á meginlandinumum.

Tey bæði eru tvey kend nøvn hjá messiansku jødunum í Ísrael og ikki minst eru tey kend ígjøgnum sang og tónleik. Tey hava gjørt bæði løg og tekstir til nógvar sangir, ið verða sungnir í messianskum samkomm og tey hava eisini givið nakrar fløgur út. Tey ferðast eisini nógv og syngja og tala, bæði í í Ísrael og uttanlands. David og Lisa Loden búgva í Netanya, har David er prestur í eini samkomu, sum tey stovnaðu, tá ið tey komu til býin fyri 25 árum síðani. Síðaðni er samkoman spakuliga vaksin til tey í dag eru nøkur hundrað fólk. Lisa hevur verið leiðari á Caspari miðstøðini í Jerúsalem, sum millum annað arbeiðir við undirvísing og íblástri, bæði fyri messianskar jødar og fyri onnur. Tey geva eisini bøkur út og halda skeið. Nú arbeiðir hon meiri saman við manninum í sjálvari samkomuni. Týsdagin klokkan 20 eru tey í Missiónshúsinum á Toftum og Mikukvøldið klokkan 20 eru tey í Emmaus í Klaksvík.

Á øllum tiltøkunum fara tey at tala, syngja og greiða frá teirra arbeiði. Tulkað verður til føroyskt.

# Carl Johan Jensen okkara besta boð til virðisløn

**Nýggjasta yrkingasavnið eftir Carl Jóhan Jensen er føroyska uppskotið til Norðurlendsku bókmentavirðislønina 2008**

TÍÐINDASKRIV

Yrkingarsavnið »September í bjørkum sum kanska eru bláar« eftir Carl Johan Jensen er føroyska uppskotið til bókmentavirðislønina hjá Norðurlandaráðnum næsta ár.

Tey flestu Carl Jóhan Jensen sum krevjandi bókligan yrkjara við egnum serskildum stíli, men at málsliga rannsóknin í yrkingunum ikki er eitt endamál í sær sjálvum er týðiligt í nýggjasta savni hansara frá 2006, sigur innstillingarnevndin í tíðindaskrivi

Í yrkinginum býr ein eksistentiellur ivi og longsul og tær eru um grundleggjandi tilveruspurningar, og hesir verða fluttir bæði aftur og fram í tíð og samantvinnaðir við tað at yrkja.



*Carl Johan Jensen er innstillaður annað ári á rað*

Yrkingasavnið ber enska undirheitið »The afflictions of the reverend J.H.O. Dünn«, t.v.s. yrkingarnar snúgva seg um prest, hvørs navn minnir um navnið á føroyska J.H.O. Djurhuus og enska yrkjaran úr 1600-talinum John Donne. Yrkingasavnið letur seg tí lesa sum ein frásøgn um stumblandi royndirnar hjá prestinum at skilja heimin, menniskjuni og seg sjálvan. Ein ørgrynna av motivum, myndum og tilsipingum geva frásøgnini um prestin serstaka megi og dýpd.

»September í bjørkum sum kanska eru bláar« er sjáldsama heilrunnið savn. Ein villur vilji og longsul býr í fleiri av yrkingunum, men styrkin og serligi innari spenningurin í savninum liggur í teimum máttmiklu og málsliga ekvilibristisku lýsingunum av menniskjansligari ómegd, sigur innstillingarnevndin.




**PARTABRØVINI HÆKKAÐU**
Evropisk partabrøv eru hækkað 2,75% í farnu viku. Serliga týska IFO talið fekk vísitølini at hækka mikudagin.

**FAROE PETROLEUM TEKUR STÓR FET**
Seinasta fríggjadag komu ikki færri enn trý tíðindaskriv frá Faroe Petroleum við stórtíðindum. Avtala er gjørd við Shell um ogna sær 5% av Williams brunninum, sum verður boraður á føroyskum øki í løtuni. Stórur váði er knýttur at brunninum, men hinvegin er møguleiki fyri einum stórum fundi um rakt verður við. Óansæð úrslitið fær felagið atgongd til tíðandi vitan, sum kunnu nýtast tá borað verður aðrastaðni á atlantsmótinum. Tíðindir frá hesari boringini verða hildin loynilig eina tíð aftrat. Avtalan gevur eisini felagnum eina part av eini gasskeldu og eitt leitiloyvi í norskum øki.
Ein avtala er gjørd við týska felagið E.ON Ruhrgas um at Faroe Petroleum fær tvey gassloyvir. Annað framleiðir gass og hitt sum liggur tætt uppat, er ætlanin at fara undir gassframleiðslu í næstum. Harumframt fáa teir eitt leitiloyvi í norskum øki. Afturfyri letur Faroe Petroleum 15% av Fogelberg loyvinum í norskum øki, umframt at gjalda 70 mio. kr og nakað av boriútreiðslum.
Felagið boðaði eisini frá, at teir hava framt eina kapitalhækking uppá 470 mió kr. Hettar fer at tryggja tað stóra virksemi sum m.a. fevnir um at bora 26 brunnar frá 2007 til endan av 2009, umframt at menna og virðisøkja verðandi loyvir. Hetta letur upp fyri stórum kurshækkingum komandi tíðina.

**RENTAN ÓBROYTT**
10 ára danska lánsbrævarentan liggur óbroytt á 4,17%. Partabrævamarknaðurin og rentufundirnir kunnu fara at ávirka rentuna hesa vikuna.

**HESA VIKUNA**
Íleggjarar fara hesa vikuna serliga at halda eyga við rentufundunum í ECB og BoE hósdagin. ECB fer væntandi at halda rentuna óbroytta meðan BoE kann lækka rentuna hósdagin. Fríggjadagin kemur mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1376,56 | + 3,37% |
| Alheims partabrøv | 8155,60 | + 3,13% |
| Atlantic Petroleum | 1829,00 | -5,72% |
| Føroya Banki | 200,00 | -0,99% |
| Eik Banki | 537,00 | -14,76% |
| KB Trygg Eurostoxx | 110,88 | + 1,74% |
| USD | 508,41 | + 0,04% |
| JPY | 4,60 | -1,38% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK